Oyggjarfundirnir vóru gevandi

Útoyggjanevndin heldur tíðarætlanina fyri sítt virksemi, og tey halda seg hava fingið nógv burtur úr Oyggjafundunum, sum hava verið kring landið

EYÐUN KLAKSTEIN

Útoyggjanevndin, sum varð sett at kanna umstøðurnar og møguleikarnar fyri menning á útoyggjunum, heldur tíðarætlanina fyri sítt virksemi.

Í síðstu viku hevði nevndin fund, har tey viðgjørdu tað tilfarið, sum higartil er savnað inn. Eisini var arbeiðsætlan løgd fyri restina av arbeiðnum.

– Enn heldur tíðarætlanin, men summar frítíðin, sum nú er fyri framman, kann seinkað innsavningina av tilfari frá stovnum og fyritøkum, sigur Olga Biskopstø, sum er samskipari og formaður í útoyggjanevndini, í tíðindabrævi til fjølmiðlarnar.

Á fundinum, sum er tann næsti hjá útoyggjanevndini, viðgjørdi nevndin tað tilfar, sum higartil er savnað inn, og avgjørt var at seta fólk at hava ábyrgd av ymsum økjum av verkætlanini.

Nevndin viðgjørdi eisini nøkur av teimum evnunum, sum vísa seg at vera í brennideplium, millum annað landbúnaðurin, jarðarviðurskifti og samferðsla. Eisini viðgjørdi nevndin mentan og siðaarvin í sambandi við røkt av haga og

Útoyggjanevndin kannar, hvussu umstøðumar á útjaðarplássum sum Hattarvík kunnu betrast

bjørgum, sum er í vanda fyri at doyggja út, um ikki lógir og reglur á hesum øki verða lagaðar til.

Skrivstovuveldið ein trupulleiki

Í tíðarskeiðinum frá 2. til 12. mai vórðu Oyggjarfundir hildnir ymsastaðni, og hesir fundur vóru bæði áhugaverdir og gevandi, heldur nevndin.

– Skrásetingin av tí, sum kom burtur úr hesum fundum, er um at vera liðug, og gevur eina góða mynd av umstøðunum, sum fólkið á útoyggjunum livir undir, sigur Olga Biskopstø.

– Tilfarið lýsir teir fyrimunir og tey lívsvirði, sum lívið á útoyggjunum hevur við sær, men vísir eisini, hví tað er so trupult framhaldandi at búsita útoyggjarnar.

Umframt vantandi arbeiðspláss og aðrar umstøður, er skrivstovuveldið og lógarverk eisini ein forðing fyri búsetingini á útoyggjunum.

– Forðingar fyri menning botn í fleiri ymiskum viðurskiftum, frá stirvnum og illa tillagaðum lógarverki til praktiskar forðngar – millum annað í umsitingini, har tað kann verða trupult at finna runt í skrivstovuveldinum, sigur Olga Biskopstø í tíðindabrævinum.

– Eisini eru fleiri viðurskifti, sum bert krevja smávegis broytingar í dagligu mannagongdini í almennu tænastuveitingunum fyri at gera livilíkindini munandi betur.

Senda uppskot inn

Infrastrukturin er eitt øki, sum fyllir nógv í innsavnaða tilfarinum. Hetta verður mett sum lívsæðrin fyri menning, og millum annað verður tosað um tunnil til Gásadals og ferjuegu á Kalsoynni.

Øll uppskot, sum eru komin til útoyggjanevndina, verða viðgjørd, og enn ber eisini til at senda uppskot inn. Higartil eru uppskot innkomin, sum fevna frá ítøkiligum vinnuvirksemi til broytingar í jarðarlóggávuni.

Um fólk hava hug at senda uppskot inn ella gera onkrar viðmerkingar, ber til at senda hetta til Løgmansskrivstovuna og viðmerkja, at tað er ætlað Útoyggjaverkætlanini.

SOLEIÐIS
FÆRT TÚ FATUR Á OKKUM
Ring til okkara á telefonnummar:
3 x 35
- og síðani eitt lokalnummar:
Ur/smúkkudeildin: + lokal 11
Bókhaldið: + lokal 12
Fløgudeilin: + lokal 13
Fotodeildin: + lokal 14
Electronic: + lokal 17
Og okkara telefaxnummar er:
35 35 36

- eisini ber til at ringja beinleiðs:
Fotodeildin: 35 35 34
Fløgudeilin: 35 35 33
Bókhaldið: 35 35 32
Ur/smúkkudeildin: 35 35 31
Electronic: 35 35 37
3arin
SMS · Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36
E-mail: tryarin@post.olivant.fo
SANSIR · TEL 355 355

Austrian Art Ensamble í Norðurlandahúsinum

SUMMARTÓNAR 2000:

Austrian Art Ensemble Norðurlandahúsinum í kvøld.

Á Summartóna-konsert í kvøld verður tónaverkið hjá Werner Schulze, sum á gjárkvøldið fekk føroyska frumframførslu í Fuglafjarðar Kirkju, at hoyra í Norðurlandahúsinum.

Framførsluna fremur *Austrian Art Ensemble* úr Eysturríki. Hetta ljómlið varð stovnað 1980 í Graz og hevði tað sum sína upprunaligu ætlan helst at framføra teaturtónleik. Men sum frá leið er AAE vorðið eitt gitið kamarorkestur, sum umframt at taka lut í teaturframførslum eisini hevur egnar konsertir og tá helst við nútíðar tónleiki.

Stovnari og leiðari orkestursins *Wim van Zutphen* er úr Hollandi. Hann fekk sær útbúgving í klaverspæli, leiðslu og innan elektroniskan tónleik í Utrecht. Seinni er hann fluttur til Graz í Eysturríki, har hann á tónlistaháskúlanum framhaldandi útbúði seg í jazz tónasmíð.

Solistur í LLULL er mezzosopranin *Dagmar Hödl*. Hon kemur úr Steiermark í Eysturríki. Útbúgving fekk hon í Graz og Mainz, og sum konsertsangari hevur hon vitjað víða um í Europa og Asia, umframt at hon sum operasangari ofta er á palli bæði í Eysturríki og í Týsklandi.

Umframt at vera fastur limur í Austrian Art Ensemble undirvísir Dagmar Hödl á Universität für Musik und darstellende Kunst í Graz.

Á konsertini í kvøld í Norðurlandahúsinum syngur Petra Iversen kingosálmar og ein dupultkvartett úr Havnarkórinum syngur gamlan føroyska fólkatónleik.

- Haldi fast við triðingin

Arbeiðsgevarafelagið sigur, at tað er munur á vinnum, har rakstrarloyvi krevst og vinnum har slík loyvi ikki eru kravd. – Tí eiga myndugleikarnir at halda fast um at útlendski ognarparturin verður avmarkaður til 33 prosent, skrivar Vinnuhúsið í morgun

SVEINUR TRÓNDARSON

- Tað er avgerandi munur á loyvistengdum vinnum, sum fiski og alivinnu, og øðrum vinnugreinum, har óavmarkað atgongd er at taka upp vinnuvirksemi. Tí heldur felagið tað vera rætt, at hildið verður fast við verandi mark, har útlendski ognarparturin er avmarkaður til 33 prosent.

Hetta er niðurstøðan, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag er komin til, eftir at hava viðgjørt málið um ognarviðurskiftið á nevndarfundi 15. juni.

Sambært Vinnuhúsinum, er felagið av teirri áskoðan, at lógargrundarlagið, um neyðugt, má broytast, so hesar reglur standa púra greiðar. Kjakið seinastu tíðina bendir á, at eitt nú alilógin ikki lýkur hesi krøv. – Neyðugt er, at lógargrundarlagið verður tillagað, so fullkomiligt gjøgnumskygni er í øllum eigaraviðurskiftum innan allar loyvistengdar vinnur.

Tað hevur týdning fyri vinnuna og onnur uttanum vinnuna, at øll viðurskifti eru í lagi og tað eigur tað almenna at tryggja, sigur Arbeiðsgevarafelagið. – Tað almenna skal á henda hátt tryggja, at fylgjast kann við í, um reglurnar verða hildnar, og verða tær ikki tað, eigur

- Tað almenna skal á henda hátt tryggja, at tað ber til at fylgja við í, um reglurnar verða hildnar, og verða tær ikki tað, skulu lógarásettu avleiðingarnar fylgjast, og tað merkir, at loyvir kunnu vera tikin aftur, skrivar Vinnuhúsið frá fundinum hjá Arbeiðsgevarafelagnum.

Marité - eisini til yngri lesarar

BÓKAÚTGÁVA. Søgufró›i rithøvundurin, Erling Poulsen, hevur vi› áttandu bókaútgávu síni enn einafer› lati› úr hondum hugtakandi lestur um lívi› á sjónum. Bókin er á tremur vi› spennandi frásagnum, i› eisini kunnu hugtaka unga lesaran

HØGNI MOHR

Erling Poulsen, fyrrverandi lærari í Vági, gav í vár út bók, i› sprottin er úr siglingarsøgu føroyinga. Í bókini, i› er hin áttanda hjá Erlingi sí›ani 1990, ver›ur sagt frá um fiskiskipi›, Marité. Hon var onnur fransaskonnartin, i› A.P. Møller keypti til partabrævafelag sítt í Sjóvar sókn vi› árslok í 1929.

Endamáli› vi› skonnartini var serstakliga, at hon skuldi luttaka í grønlandsfiskiskapinum, sum av álvara hev›i tiki› seg upp um hetta mundi›.

Skipi› er pallurin

Erling Poulsen er tikin úr leikum sum frásøguma›ur, og hetta sæst aftur í bókini um Marité. Hóast bókin er skriva› sum frásøgn frá tá i› Marité kom til landi› í 1930 og til hon var› seld í 1978, eru frásagnirnar hvørt ári› krydda›ar vi› nógvum spennandi og bergtakandi smásøgum, i› hava samband vi› skipi›. Solei›is ver›ur skipi› n‡tt sum pallur til at framføra eina áhugaverda mynd av livi-umstø›um føroyinga tá á døgum.

Myndatilfari› í bókini er ógvuliga umfatandi og stórsligi›. Harumframt eru nógvar andlitsmyndir av mongu monnunum, i› fóru mangan brattan vi› fransaskonnartini.

Eisini fyri ung

Hvussu bókin er sum søguligt verk, dugir bla›ma›urin ikki at meta um. Men hon er i› hvussu so er ein spennandi mynd av eini farnari tí›.

Hóast ein kundi hildi›, at frásagnirnar í bókini í størsta mun venda sær til eldra ættarli›i› í Føroyum, er hetta valla so. Frásøguhátturin hjá Erlingi er somiki› lættur og hugtakandi, at eisini unglingar kundu ver›-i› hugtiknir av honum.

Bókin um Marité er 134 bla›sí›ur og kostar 180 krónur.

Bókin hjá Erlingi Poulsen um fransaskonnartina er ein spennandi mynd av eini farnari tí›. Her er Marité avmynda› í Toqqusaq í Grønlandi.

Myndir: úr bókini Marité



Hesin fl‡tur á stokkunum. Nógv var› lagt fyri tá i› Grønlandsbátarnir fingu fisk. Menninir á bátunum blaka›u vei›una upp á skip, sum t.d. Marité, har fiskurin var› flaktur og salta›ur.

Marite hevur fingi› ein rangan sjógv 6. oktober! 1967. Báturin á dekkinum fór í knús, og seinni fyri bor›. Hesa myndina og a›rar av somu hending tók navnframi ró›rarrisin, Ove Joensen, sáli, av st‡rhústakinum á Marité.

Hondgjørt prýði til føroyska búnan
Støkk inn á gólvið og síggj okkara stóra og góða úrvæl av hondgjørdum prýðislutum úr silvuri til føroyska búnan.



Eisini hava vit skógvaspennir, knappar, stimar og aðrar prýðislutir til føroyska búnan



Pf. Eilif Arge
Tel 455164, Klaksvík
Fa. Magnussen, ur & optik
Tel 373232 Vágur
Ur- og Brillustovan
Tel 447950, Runavík
Ursmiðjan
Tel 332024, Sørvágur
3arin
SMS · Tel. 353535 · Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo
SANSIR TEL 355 355